Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	22. september 2023
Mál nr.:	23/19027
Málsviðgjørt:	BH/OYS
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22. september 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Góðkenning av flutningsskipanum og landskassastudningur til útreiðslur av góðkendum flutningsskipanum verða strikað)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022, verða § 33, stk. 7-9 strikaðar.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Fyri at javnseta allar kommunur verður mett rímiligt at taka burtur endurgjaldið, sum nakrar kommunur fáa til næmingaflutning. Talan er um eina endurgjaldsskipan, sum mett verður, at tíðin er farin frá, nú fleiri kommunur hava mist rættin til endurgjald, tí tær hava valt at verða samanlagdar í størri eindir. Endurgjaldið verður einans veitt, um næmingaflutningurin er um kommunumark.

Har skúlasamstarv er millum kommunur, kundi ein meira rímilig loysn verið, at útreiðslurnar til næmingaflutningin verða roknaðar sum ein partur av rakstrarútreiðslunum hjá skúlanum, sum soleiðis varð spjaddur út á allar næmingarnar í skúlasamstarvinum og ikki ta einstøku kommununa.

Umrøtt hevur eisini verið, at ein møguleiki er at endurskoða, um økir, sum í dag fíggjarliga eru deild millum land og kommunu, til fulnar skulu fíggjast av tí partinum, ið hevur ábyrgdina av tí einstaka virkisøkinum. Mett verður, at av tí at talan er um eitt kommunalt mál, eigur kommunan at bera hesar útreiðslur og ikki landið.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi reglur eru ásettar í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022.

Eftir galdandi reglum um næmingaflutning verður landskassastuðul latin til lutvíst at rinda útreiðslurnar til góðkendar flutningsskipanir fyri næmingar, sum ikki ganga í skúla í síni egnu bústaðarkommunu.

Í galdandi § 33, stk. 7 er ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna tær flutningsskipanir, ið kommunustýrið hevur gjørt sambært § 33, stk. 1, 3 og 4. Í § 33, stk. 8 er ásett, at landsstýrismaðurin ásetur reglur um landskassastudning til lutvísa rindan av útreiðslum til góðkendar flutningsskipanir eftir stk. 1. § 33, stk. 9 ásetur, at landsstýrismaðurin í serstøkum føri kann víkja frá reglunum í § 33, stk. 1-6, eins og hann kann loyva, at endurgjaldsútreiðslur, ið standast av læraraflutningi, kunnu verða viðgjørdar eftir somu reglum sum útreiðslur av næmingaflutningi eftir 1.- 3. stk., um so er, at slík skipan verður hildin at vera betur hóskandi.

Harumframt er ásett í kunngerð nr. 115 frá 22. novembur 2000 um næmingaflutning, at landskassastuðulin er 50% av útreiðslunum, ið standast av frammanundan góðkendari flutningsskipan, sbrt. § 3, stk. 1. Í § 3, stk. 2 í kunngerðini er ásett, at kommunustýrið skal senda landsstýrismanninum uppgerð um stuðul, sum er fallin til gjaldingar, innan 15. februar árið eftir, at stuðulsárið er farið.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at broyta verandi skipan viðvíkjandi endurgjaldi fyri næmingaflutning. Tað er í verandi skipan við lóg álagt kommunustýrinum at skipa fyri næmingaflutningi. Útgangsstøðið er, at kommunustýrið ber útreiðslurnar fyri næmingaflutningin. Tó er ásett í kunngerð um næmingaflutning, við heimild í fólkaskúlalógini,

at landskassastuðul verður latin fyri 50% av útreiðslunum. Hetta er galdandi, um flutningurin er um kommunumark.

Tað er mett rímiligt, at næmingaflutningur, sum er eitt kommunalt øki, verður fíggjaður kommunalt. Hetta merkir, at landskassastuðul ikki skal rindast til skipanina.

Av tí at landið ikki fer at veita landskassastuðul til næmingaflutning, og kommunustýrið frameftir skal bera hesar útreiðslur, verður mett, at tað er rímiligt, at kommunustýrið skal taka avgerð um flutningsskipan. Ætlanin er tí, at landsstýrismaðurin frameftir ikki skal góðkenna flutningsskipanir.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Verandi skipan viðvíkjandi næmingaflutningi verður broytt. Higartil hevur landið goldið 50% av útreiðslunum fyri næmingaflutning. Eftir ætlan verður landskassastuðulin ikki veittur frameftir, og fara kommunurnar tí at bera allar útreiðslurnar av næmingaflutninginum, ið er eitt kommunalt mál.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring. Lógaruppskotið er fyrireikað í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, har ein fortreyt er, at landskassastuðul ikki skal veitast frameftir til næmingaflutning. Lógaruppskotið skal tí verða lagt fram og samtykt í seinasta lagi samstundis sum fíggjarlógaruppskotið. Avgerðin um at fyrireika málið bleiv tikin ov seint til at klára at senda uppskotið til almenna hoyring.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Eftir verandi skipan rinda kommunurnar fyri næmingaflutning uttan fyri kommunumark, og landskassastuðul verður síðani latin fyri 50% av útreiðslunum. Av tí at landskassastuðulin eftir hesum lógaruppskoti verður strikaður, mugu allar kommunur sjálvar fíggja stuðulin, sum tær í dag fáa frá landskassanum.

Fyri landið merkir tað, at man ikki skal veita 50% av landskassastuðli til næmingaflutning. Sparingin á fíggjarlógini fyri 2024 verður 2,4 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Eins og áður verða tað kommunustýrini, ið skipa fyri næmingaflutningi. Tó verður minni umsiting, tí landsstýrismaðurin skal ikki longur góðkenna flutningsskipanir, og kommunurnar skulu ikki longur senda landsstýrismanninum uppgerð um stuðul, og landsstýrismaðurin skal heldur ikki viðgera umsóknir um landskassastuðul longur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar fyri umhvørvið. Lógaruppskotið broytir ikki, hvussu flutningur skal skipast, einans hvør tað er, ið ber útreiðslurnar hesum viðvíkjandi, og hvør tað er, ið góðkennir flutningsskipanirnar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Broytingin hevur avleiðingar við sær fyri útjaðaran og smærru kommunurnar, sum í verandi skipan hava møguleika fyri at fáa 50% av flutningsgjaldinum endurgoldið, tá ið næmingar teirra fara í skúla í aðrari størri kommunu at ganga í skúla. Her kann vera talan um næmingar, sum ganga alla sína skúlagongd í aðrari kommunu ella fara í annan skúla í hádeild ella eru partur av skúlasambandi. Tað kann møguliga hava við sær, at smáar kommunur verða lagdar saman við størri kommunum. Hetta fyri at hava betri rásarúm til at fíggja næmingaflutningin, og skal tann lítla kommunan tá ikki bera útreiðslurnar fyri næmingaflutningin.

Broytingin hevur onga avleiðing við sær fyri størri kommunur í landinum. Ikki uttan so at broytingin í lógini fer at hava við sær broyttan skúlabygnað lokalt, t.v.s. at man fer at opna lítlar skúlar aftur, og tískil fer at merkja, at næmingar ikki longur koma í skúla í størru kommunum at ganga í hádeild. Har skúlasamstarv er millum kommunur, kundi ein loysn verið, at útreiðslurnar til skúlabarnaflutningin verða roknaður sum ein partur av rakstrarútreiðslunum hjá skúlasamstarvinum, sum soleiðis varð spjaddur út á allar næmingarnar í skúlasamstarvinum og ikki ta einstøku kommununa.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri uppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri uppskotið.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki við sær revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið ásetur ikki reglur um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Í § 3 í kunngerð nr. 115 frá 22. november 2000 um næmingaflutning eru ásetingar um landskassastuðul, m.a. viðvíkjandi hvussu stórur landskassastuðulin er og viðvíkjandi uppgerð frá kommunustýrinum um stuðul.

Av tí at § 33, stk. 8 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022, verður strikað, er heimildargrundarlagið til at áseta omanfyrinevndu reglur í kunngerð ikki til staðar longur. § 3 í kunngerð um næmingaflutning skal tí eisini strikast.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1
Ásett verður, at § 33, stk. 7, 8 og 9 verða strikað.

Í § 33, stk. 8 var ásett, at "*landsstýrismaðurin ásetur reglur um landskassastudning til lutvísa rindan av útreiðslunum til góðkendar flutningsskipanir eftir stk. 1*". Av tí at § 33, stk. 8 verður strikað, skal landskassin ikki longur gjalda 50% av útreiðslunum fyri næmingaflutning, sbrt. § 3, stk. 1 í kunngerð nr. 115 frá 22. november 2000 um næmingaflutning.

Mett varð í hesum sambandi, at av tí at kommunustýrið frameftir ber allar útreiðslur av næmingaflutningi, eigur landsstýrismaðurin ikki longur frammanundan at góðkenna tær flutningsskipanir, sum kommunustýrið hevur gjørt, sbrt. § 33, stk. 7.

§ 33, stk. 9 verður eisini strikað. Ásett var, at landsstýrismaðurin í serstøkum føri kundi víkja frá reglunum í § 33, stk. 1-6 í fólkaskúlalógini. Av tí at næmingaflutningur frameftir til fulnar fer at liggja undir kommunustýrinum, bæði umsitingarliga og fíggjarliga, verður ásetingin um, at landsstýrismaðurin kann gera undantak til næmingaflutning eisini strikað.

Eisini var ásett, at landsstýrismaðurin kundi loyva, at endurgjaldsútreiðslur fyri læraraflutning kundu verða viðgjørdar eftir somu reglum sum næmingaflutningur, um so hildið varð, at slík skipan var betur hóskandi. Higartil hevur tað verið landið, ið hevur goldið útreiðslur til læraraflutning, og ætlanin er ikki at broyta verandi skipan. Av tí at heimildin at geva loyvi ikki verður brúkt, verður hesin parturin av ásetingini strikaður.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 28. september 2023

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur